# ítróttur

Nr. 187 • fríggjadagur • 3. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Nýggj talv-nevnd

Talvsamandið hevði aðalfund leygardagin, og nú hevur nýggja nevndin skipað seg

Tað var longu greitt undan fundinum, at Rani Nolsøe fór at siga seg frá sum formaður, og at okkurt skifti tí fór at verða.

Nýggja nevndin hevur nú skipað seg, og sær hon soleiðis út:

Andrias Ziska, formaður, Sámal Christiansen, næstformaður, Jógvan Joensen, kassameistari, Jóhannes Ellefsen, skrivari, Rúni Dragaberg, nevndarlimur. Eykalimir eru Jógvan Martin Joensen og Tórhallur Thomsen

**-jm**

# VÍF kvinnurnar fáa nýggjar útlendingar

**Afturat Ioanu Rápa verða tvær nýggjar rumenskar kvinnur við á liðnum hjá VÍF í vetur**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*VÍF hevur sett sær sum mál at afturvinna gullmerkini, sum tær í fjør mistu til VB*

Einki er at taka seg aftur í, at VÍF seinnu árini hevur verið í avgjørda oddinum í føroyskum kvinnuhondbólti. Eftir tvær greipur á rað vóru VB teimum tó ov boysnar í fjør, men nú verður so aftur ein nýggj roynd gjørd eftir gullinum í Vestmanna.

Í mun til liðið í fjør er tó talan um nakað av frágongd. Manuela Stan er við barn, og fær tí ikki vart málið í vetur, meðan ein heilur flokkur av leikarum er farin vestur gjøgnum tunnilin til Sóljuni. Hertha Simonsen, sum undan árinum í fjør eisini spældi við Sóljuni, er ein teirra, og hartil hava Nicoleta Radu og Hallfríð Isaksen gjørt av, at tær eisini fara at spæla við Sóljuni komandi árið.

Men maður kemur í mans stað (M/K) verður sagt, og soleiðis tykist eisini vera í Vestmanna. Felagið hevur í øllum førum gjørt avtalu við tvær rumenskar kvinnur, og í løtuni verður bert bíða eftir at pappírsarbeiðið verður avgreitt, áðrenn tær seta kós móti Vestmanna. Higartil hevur pappírsarbeiðið tó tikið einar tríggjar mánaðir, so formaðurin í felagnum, Jógvan Sigurd Poulsen, tykist ikki vera sannførdur um, at tað fer at bera til at hava tær við longu frá fyrsta dystinum. Nýggju leikararnir eita Adela Burcea, sum er málverji, og Irina Rodevici, sum er strikuspælari.

Hartil roknar felagið eisini við nakað av tilgongd úr egnum røðum. Eitt arbeiði, sum VÍF seinnu árini hevur lagt nógva orku í, og sum seinastu tvey árini eisini givið úrslit í, at nakrar blaðungar gentur so smátt eru um at troka seg framat besta liðnum.

Hvussu er og ikki, so verður tað aftur meldað út í Vestmanna, at gull í bæði lands- og steypakapping er málið, men tað verða tær so einsamallar um at gera av, so svarið til tann spurningin má bíða til einaferð á vári næsta ár.

# Endaðu á triðja plássinum

**Føroysku U-19 kvinnurnar vunnu ein og taptu tveir dystir í EM-undankappingini í Slovenia**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein sterkur bólkur, sum føroysku kvinnurnar endaðu í, tá lutakastið til hesa EM-undankappingina var. Bosnia, Spania og Belgia vóru mótstøðuliðini, og serliga hesi bæði seinastu vórðu undan fráferðini roknað sum sera stórir gloypibitar. Bosnia hevur føroyska liðið áður leikt ímóti, og tó at talan tá var um tap, so var hetta av tí heilt tepra slagnum, og tí vóru vónirnar ikki heilt ongar undan hesm.

### Mál í føðingardagsgávu

Fyrsti dysturin á ferðini varð leiktur leygardagin ímóti Bosnia. Og føroysku kvinnurnar løgdu hart út. Talan gjørdist um ein tepran 1-0 sigur, men á landsliðsvenjaranum skiltist eftir dystin, at hetta var væl og virðiliga uppiborið. Við Útvarpið segði venjarin tá, at talan sum so var um ein sera javnan dyst, men at føroyska liðið hevði fleiri møguleikar at økja um leiðsluna, uttan at tikið varð av hesum.

Einsamallið í málið í dystinum stóð Ása á Neystabø fyri, tá hon miðskeiðis í fyrra hálvleiki setti brotsspark í netið. Hon hevði eisini føðingardag hendan dagin, og tá eingin onnur vildi átaka sær ábyrgdina sum brotssparksskjútti, so avgreiddi hon hetta uttan stórvegis hóvasták.

Sama dag leiktu Spania og Belgia sínamillum dyst, og her vann Spania greiðan 4-0 sigur. Tí kundi onkur á føroyska liðnum gerast heldur bangin, tá Føroyar í næsta umfarinum taptu 5-0 fyri Belgia, eftir at støðan annar fram til 72. minutt hevði verið 1-0.

Men móti spanska liðnum gekst tó betur hjá okkara. Talan varð aftur um greitt tap, tá Spania eftir 2-0 í steðginum vann dystin 4-0, men hóttandi sorlið kom so ongan tíð upp á tal, og yvirhøvur má sigast, at føroyska liðið aftur hesaferð stóð seg framúr væl.

Tað hevur eisini fleiri ferðir verið havt á munni, at talan her er um ein hin besta árgangin, sum føroysku kvinnufótbóltur hevur havt, og eitt nú vóru tær í fjør sera nær við at koma víðari úr bólkaspælinum í undankappingini.

Tær, sum mannaðu føroyska liðið, vóru Asta Magnussen, Elin Katrina Haraldsen og Jytta Drangastein úr AB. Lív Horsdal, Unn Kragesteen, Selma Dahl Erol, Ása Christiansen, Elsa Maria Olsen og Ása á Neystabø úr B36. Randi S. Wardum, Malan á Dunga, Ása úr Dímun, Kristina D. Simonsen og Linda Weihe úr HB. Anja Klæmintsdóri úr GÍ. Doris í Garði Joensen úr EB. Mary-Ann Isaksen og Maibritt Svalbard úr B68. Venjari hjá liðnum var Álvur Hansen og hjálparvenjari var Jón Harald Poulsen. Hartil v´rou Sonja Skúvadal, fysioterapeutur, Elin Christiansen, liðleiðari og Guðrið Joensen, ferðaleiðari, við á ferðini.


## Tofta kvøldskúli

**veturin 2003/2004**

**Almenn frítíðarundirvísing**

**Handarbeiði**

Jap. kunstbroderi/broderi til før. búnan/hedebo/hvítseyming/svartseyming/nálabinding

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | kl. 16.00–19.20 | Jessie Høgagarð | Tlf. 447290 |
| Týsdag | kl. 16.00–19.20 | Jessie Høgagarð | Tlf. 447290 |
| Hósdag | kl. 18.45–22.00 | Jessie Høgagarð | Tlf. 447290 |

**Seyming**

4 vikuskifti fyri jól og 5 eftir jól

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | kl. 19.00–22.00 | Maria Rasmussen | Tlf. 447833 |
| Leygardag | kl. 13.00–18.00 | | |

**Datalæra, tekstviðgerð á byrjanarstigi**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | kl. 19.00–21.35 | Ragnar Joensen | Tlf. 219841 |

**Klaver og orgul**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eftir avtalu | | John Mortensen | Tlf. 448272 |

**Guittarspæl**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | eftir avtalu | Heri Joensen | Tlf. 447332 |

**Postalínsmáling**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | kl. 19.00–22.00 | Maria Rasmussen | Tlf. 447833 |

**Heilsa og kostur – og hvussu nýta vit føroyskar urtir í matgerð**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | kl. 18.00–21.00 | Olga Hentze | Tlf. 448659/224258 |

**Fimleikur fyri rørslu- og menningartarnað**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | kl. 18.00–19.40 | Frida Andreassen | Tlf. 224264 |

Undirvísingin er treytað av nóg góðari undirtøku og av góðkenning frá myndugleikunum.

**Undirvísingin byrjar í viku 43.**

Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri 1. lærugrein
200 kr. – 2. lærugrein
100 kr. – 3. lærugrein

Í lærugreinum, har nógv verður kopierað –50 kr. kopigjald.

Datalæra kostar 50,- kr. eyka fyri prenting og pappír.

Goldið verður tað fyrsta kvøldið.

Upplýsingar fáast frá kvøldskúlaleiðaranum, tlf. 447332

**Tofta kvøldskúli**

## Berlingo vøruvognur

8 mðr. gamal Berlingu HDI vøruvognur til sølu.

**Tlf. 210298**

## Svimjihylurin í Gøtu

Søkt verður eftir ansingarfólki (m/k) til svimjihylin í Gøtu.

Svimjihylurin er opin: Mikudag kl. 17–21
Fríggjadag kl. 17–19
Leygardag kl. 9–10
– kl. 15–18
Sunnudag kl. 8.30–10

Spulast/takast upp skal eftir almennu svimjingina. Roknast kann við, at tann/tey, ið sett verða, skulu taka bjaringarroyndina.

Skrivlig umsókn við upplýsingum, viðmælum og møguligum prógvum skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 13. oktober kl. 12.00.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella onga at taka.

Götu Kommuna

FR-510 Gøta · Tlf. 441012 · Fax 441874

## Limafundur

MBF skipar fyri limafundi í høllini á Sjómansskúlanum mikudagin 8. oktober kl. 19.00.

Elspa Olsen, deildarleiðari á Almannastovuni, greiðir frá um

**»Brekaðtoymi«.**

Allir limir eru vælkomnir.
Møtið fjølment.

FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$*
*annars sambært avtalu.*

***Vøruskrá kann fáast!***

## Sp/f Á-grýtni

**ALT ARBEIÐI INNAN:**

**Timbur**
**HVS** (hita,vatn & sanitet)
**Ravmagn** (el)

**Ring og hoyr nærri til:**

Rólant - tel 21 16 49 ella
Ben Gurion - tel 72 16 48
á kvøldi - tel 42 16 48
ella tel 42 16 49



Sosialurin 341800

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 544, P/F Smyril-Line, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Hans Mortensen, Gróthúsvegur 6, 188 Hoyvík (formaður).
**Innkomin í nevndina:** Jens Kári Vilhelm, Gróthúsvegur 19, 188 Hoyvík.
**Innkomin sum formaður:** Heðin Klæmint Weihe, Marknagilsvegur 64, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 1. Oktober 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3222, P/F DONG Føroyar, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Per Mørch Sørensen, Tunet 9, DK-3450 Allerød (næstformaður).
**Innkomin sum næstformaður:** Mads Peter Arndal Lauritzen, Skovvej 21, DK-2950 Vedbæk.

*Skráseting Føroya tann 1. Oktober 2003*

*Kristin Balle*